## Laksur skal íðka ítrótt

Eins og vit menniskju hevur fiskur gott av at íðka ítrótt. Hetta hava norskir granskararar funnið útav. Harald Takle, sum stendur á odda fyri einum granskarabólki, sigur, at sum heild er alilaksurin í góðum formi, men fyri at styrkja hjartaorkuna, er laksurin settur í intensiva venjing. Orsøkin til granskingina á hesum økinum er óttin fyri, at fiskur eins og menniskju skulu útvikla lívstíðarsjúkur, tí hann ikki rørir so nóg nógv. Granskararnir hava gjørt royndir við eini plusklokku, sum er sett á norskan alilaks. Aðrar kanningar hava víst dømi uppá, at hjørtuni hjá onkrum alilaksi ikki vóru so væl fyri, sum á villaksi. Kelda: forskning.no



## Luktisansur avdúkar strongd

Granskarar á universitetinum í Melbourna í Avstralia hava funnið útav, at manglandi luktisansur kann koma av posttraumatiskari strongd. Hetta kemur fram í eini kanning av luktisansinum hjá krígsveteranum. Granskararnir vísa á, at hendan nýggja vitanin kann brúkast til at viðgera og fyribyrgja aggressión. Veteranarnir, sum vóru sammettir við 31 vanligar menn, høvdu heilt upp í 25 ár eftir, at teir vóru í eini krígsstøðu, stórar sosialar og kensluligar trupulleikar. Kelda: forskning.no

# Nýggj brennistøð kann geva grøna orku til 2000 húsarhald

**Ein nýggj risa-brennistøð fyri allar Føroyar, kann geva streym til 2000 húsarhald, men higartil hevur Tórshavnar Kommuna ikki víst ætlanini áhuga**

BURTURKAST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*IRF sigur, at nógvir fyrimunir eru við eini stórar, felags Brennistøð fyri alt landið, men fyribils er ongin áhugi frá Tórshavnar Kommunu til at vera við í eini slíkari ætlan*

Tað besta fyri búskapin og umhvørvið, er, at Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, IRF, og Kommunala Orku og Brennistøðin hjá Tórshavnar Kommunu, ganga saman um at byggja eina nýggja risa brennistøð í felag.

Tað hevur nevndin í IRF roknað seg fram til.

Brennistøðin hjá IRF í Leirvík hevur leingi havt ov lítla brenniorku og tí hevur IRF loddað dýpið hjá Tórshavnar kommunu fyri at vita um áhugi er at byggja eina stóra, felags brennistøð fyri alt landið.

Men á aðalfundinum hjá IRF nú um dagarnar, staðfesti nevndarformaðurin, Regin Jacobsen, at higartil hevur áhugin hjá Tórshavnar Kommunu verið so lítil, at fyribils fer IRF ikki at arbeiða víðari við tí møguleikanum.

### Streymur til 2000 hús

Regin Jacobsen sigur, at tað eru stórir fyrimunir við eini stórari felags brennistøð fyri alt landið og seinni IRF at taka hendan spurningin uppaftur.

- Tað verður ein stór avbjóðing tey næstu árini at finna ta røttu framtíðarloysnina fyri hvussu vit sleppa okkum av við burturkastið.

Í hesum sambandi sigur hann, at ein stór, felags brennistøð ber nógvar møguleikar í sær, tí hon kann gera eini 8-10 megawatt av streymi burturúr ruskinum og tað er nóg mikið av streymi til eini 2000 húsarhald, soleiðis sum mynstrið er nú.

Og hetta er uttan at nerva fjarhitan, sum eisini kann fáast frá henni.

Tað vanliga hevur verið, at eitt húski brúkar 5000 kilowatt í miðal, men tey, sum nú hava fingið sær hitapumpu, brúka tvær ferðir og upp ímóti triggjar ferðir so nógv.

- Men av tí, at ein slík brennistøð kann gera so nógvan streym, hevur ein slík loysn eisini stóran, umhvørvisligan áhuga.

Regin Jacobsen sigur, at tað loysir seg ikki at hugsa um at gera streym við teimum smáu brennistøðunum, sum nú eru.

Brennistøðin hjá IRF brennir 2,3 tons um tíman, men verður nú bygd út til at brenna trý tons um tíman.

- Men gera vit eina felags brennistøð, sum kann brenna eini átta tons um tíman, loysir tað seg væl at gera streym burtur úr ruskinum, sum eisini kann útvega brennistøðini stórar inntøkur.

### Ein hálv milliard

Hann viðgongur at talan er um eina stóra íløgu, tí heilt runt roknað, kostar ein slík brennistøð kostar einar 500 milliónir.

At Tórshavnar Kommuna higartil ikki hevur víst málinum áhuga, fær ikki Regin Jacobsen at fella í fátt, tí hóast innleiðandi prátið ikki førdi til nakað, kann gongd saktans koma á málið, tá ið meiri kjøt kemur á ætlanina og tá ið brenniorkan aftur verður ov lítil um eini 10 ár.

Kanska vóru vit góð trúgvin at halda, at ein so stór avgerð kundi takast við so stuttum skotbrái, men tað verður neyðugt at hyggja fram í tíðina.

Hinvegin tekur tað drúgva tíð at gera eina slíka brennistøð og tí heldur hann, at tað er rætt at taka málið upp nú.

Hann veit ikki, hvar hon skal vera, men tað skal vera við okkurt knútapunkt, har tað er lætt at sleppa av við streym og fjarhita og har tað ikki er ov langt at koyra.

## Dýrari at sleppa av við burturkast

**Prísirnir hjá IRF eru ikki hækkaðir í fýra ár, men nú slepst ikki undan hækkingum**

BURTURKAST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður dýrari hjá okkum at sleppa av við burturkastið.

Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, IRF, hevur avgjørt at hækka prísirnar 4% frá 1. januar at rokna.

Í løtuni betala limakommunurnar í IRF, 1.290 krónur fyri hvørt fólk í kommununi fyri at sleppa av við rusk, men á nýggjárinum hækkar gjaldið upp í 1.290 krónur.

Samstundis hækkar gjaldið hjá kommununum fyri at tøma rottangar fyri húsarhaldini, úr 140 krónum fyri hvørt fólk í kommununi, upp í 190 krónur.

Regin Jacobsen, nevndarformaður í IRF, sigur, at gjøldini fyri at sleppa av við burturkast, eru ikki hækkað í fýra ár, men nú slepst ikki undan eini príshækking.

Orsøkin er, at prísvøksturin í samfelagnum hevur verið stórur seinastu árini, serliga eru lønir og flutningur eru dýrkað, men harafturat noyðist IRF undir stórar útbyggingar nú fyri at klára at brenna undan og tær eru so dýrar, at tað er neyðugt at hækka gjaldið.

At IRF hevur ov lítla brenniorku, at tað er til stóran ampa fyri kommunurnar, virki, handlar og húsarhald, tí ávísar tíðir ber ikki til at sleppa av við burturkast.

Tí skal brennistøðin byggjast út nú fyri at klára tørvin.

Men tað eru ikki bara hækkandi gjøld hjá IRF.

- Tað er nú ókeypis at sleppa av papp og pappír til endurnýtsluna, eru nú ókeypis og tað kostar næstan onki at sleppa av við klárt plast.

- Men tað, sum skal til brenningar, verður dýrari, sigur Regin Jacobsen.

Hann sigur, at IRF tekur umhvørvislig atlit, tá ið prísir verða ásettir.

- Prísirnir lækka á øllum tí, sum verður skilt og endurnýtt, men teir fara upp á tí, sum skal brennast.



*Á nýggjárinum verður tað 4% dýrari at sleppa av við burturkast, sum skal brennast*